# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sólvá G. Olsen framsýning í Esbjerg




*Cafe & Galleri Patricia, Stormgade 5, í Esbjerg*

Fríggjadagin 8. januar letur ein framsýning hjá listakvinnuni Sólvá Gunnarsson Olsen upp í Cafe & Galleri Patricia, Stormgade 5, í Esbjerg. Í sambandi við framsýningina verður fernisering fríggjadagin frá kl. 15 - 17.

Sólvá er uppvaksin í Mattalág í Havn, elsta dóttir Herborg og Gunnar Gunnarsson. Sum ung flutti Sólvá til Danmarkar, har hon hevur búleikast síðani. Hon hevur altíð verið sera kreativ og hevur fingist við ymist handaligt arbeiði. Seinastu árini hevur hon tó fingist mest við at mála.

Umframt at mála hevur Sólvá givið frálæru í myndaseyming og aðrari kreativari seyming. Frá 1992 til 1997 fekk hon frálæru frá hollendska multikunstnaranum Baukje Zijlstra.

Sólvá hevur luttikið á fleiri framsýningum í Danmark, eins og hon eisini hevur havt framsýningar í Føroyum. Framsýningin í Esbjerg verður opin til 29. januar. Opið er frá mánadegi til fríggjadag frá 11 -17.30.

*-red*



*Sólvá Gunnarsson Olsen*


Ert tú góður við tíni húsdjór?

**So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er kvalitetsfóður, framleitt í Danmark síðan 1970. Fóðurið er framleitt úr fiski og høsnarunga og inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.






**SPECIAL** (20 kg) Fyri posan **kr. 450,-**

**SØCLA** (20 kg) Fyri posan **kr. 540,-**

**KETTUFÓÐUR** (15 kg) Fyri posan **kr. 390,-**

**Bílegging á kho@olivant.fo ella tel. 22 12 40. Ókeypis útkoyring í Tórshavn**


† 

### Andlát og jarðarferðir

**Lydia Kruse, Tvøroyri**, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi 5. januar, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13 frá Salem.

**Mads Berg Petersen, Tórshavn**, andaðist á Tjarnargarði nýggjársdag, 91 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Mads Berg, kunnu lata KFUM ella KFUK eina gávu, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum okkara, at elskaði maður og pápi okkara

**Georg Otthamar**
løgreglumaður
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 54 ára gamal.
Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.

**Christa**
**Gunnbjørn, Anna Helena og Bogi**

### Merkisdagar

**75 ára føðingardagur**
Tann 19. januar fyllir Sofus Boesen í Froðba 75 ár. Dagurin verur hildin á Høvdanum í Froðba leygardagin tann 16..01.10 kl 19.00 Øll eru hjartaliga vælkomin. Tilmelding á tlf. 372634 áðrenn 10 januar.

**Gullbrúdleyp**
9. januar 2010 hava hjúnini Arndis og Eli Davidsen, Møllemarksvej 28, 4291 Ruds Vedby, gullbrúðleyp
Dagurin verður hildin saman við næstringum, vinum og kenningum í Reerslev Forsamlings-húsi frá kl. 15.00.

**Gullbrúdleyp**
10. januar hava hjúnini Jastrid og Árni Olsen í Haldórsvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Avhaldshúsinum í Haldórsvík leygardagin tann 9. januar kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
12. januar hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan kl 13 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Dahl Sørensen Norðdepil og Rasmus Magnusson Innan Glyvur. Eftir vígsluna verður reception á Klaksvíkar Sjómansskúla frá kl 14-17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.

### Dagurin

**7. januar. Knútur hertogi.** Talan er um sonin hjá danska konginum Erik Ejegod. Hann varð myrdur av systkinabarni sínum Magnusi henda dag í 1131. Í danskari søgu verður hann róptur Knútur Lávardur, ið er sama orðið sum tað enska lord, ið merkir harri. Knútur varð skírdur halgimenni í 1169. Navnið Knútur er kanska upprunaliga norrønt og merkir júst knútur, brúktur sum eyknevni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*